# Rúsdrekka er ikki bert rúsandi løgur

DÁVID ISFELD
Hósvík



Eftir at hava lisið greinir hjá Bjørt Samuelsen og Dánjal Jákup Meinertsson um okkara ivasama rúsdrekka politik, vil eg fegin koma við einum ískoyti til hetta kjak. Vit hava nevniliga tørv á kjaki og síðani viðgerð av hesum máli, ikki sannheit Jógvan á Lakjuni?

Heimurin, og Føroyar við, er í búskaparkreppu. Hvat gera hægstu myndugleikar í Føroyum við hetta? Minst møguligt. Tjóðveldi leggur eitt uppskot fram, sum kann betra um framleiðslu, sølu og sostatt kappingarføri hjá einum parti av vinnuni. Uppskotið um at bryggja sterkt øl er vælkent og er tískil óneyðugt at siga meira um tað. Føroyar og føroyingar hava tørv á fleiri inntøkum. Uppskot verður lagt fram um eina nýggja framleiðslu, ið hóskar seg væl til útflutning, men tað fellur í tinginum. Í staðin fyri at arbeiða vinnuni at frama, sum bráneyðugur tørvur er á, so mótarbeiðir okkara løgting ein part av vinnuni. Hvat skulu vit hava slíka tingmanning til?

**Reglufastur etikkur**
Sum Dánjal Jákup Meinertsson vísti á, so segði Ingi Mohr sáli, at vit ikki eiga at gera rúsdrekkalógir út frá rúsdrekkamisnýtarum. Hesum eri eg púra samdur við. Hetta ljóðar sum eyðsýndur logikkur. Men Jenis av Rana, Bill Justinussen, Jógvan á Lakjuni og aðrir samsintir politikarar lóggeva júst eftir teimum skaðiligu dømunum av rúsdrekka. Tað er eisini greitt, at um teir ráddu einsamallir, hevði als einki øl, vín ella onnur rúsdrekka verið í Føroyum. Eg kann uttan himpr ásannað, at rúsdrekka í summum førum er skaðilig, men tað er ein bilur eisini og ein byrsa. Skulu vit lóggeva eftir hvat er skaðiligt, antin heilsuliga ella sosialt, og skulu vit síggja alt hetta sum etisk mál, ja men so gera vit tað. Men skal nakað skil vera á, so mugu vit vera regluføst um hetta; annars er bert talan um tann alt ov sjónliga og altíð hjástadda dupultmoral við teimum sjálvtænandi útveljingum, sum altíð rekst í kjalarvørrinum á etiska skipinum.

Men latið okkum líka útliva tankan um reglufasta løggeving viðvíkjandi misnýtslu; altso har ein ekstremur atburður og forhold hoyrir til: Vit hava rúsdrekkamisnýtarar, so vit bannað rúsdrekka; vit hava "fartbøllar", sum drepa og skaða ósek fólk, so vit bannað bilar; vit hava yvirvektig fólk, sum eru útset fyri happing og lágum sjálvsvirði, so vit bannað chips, sjokolátu, rómakøkur o.t.; vit hava Bíbliumisnýtarar (kristnar fundamentalistar), so vit bannað átrúnað. Ein kundi hildið á fram.

Álvaratos, hvussu nógv argumentatión skal til, áðrenn sensururin frá teimum víðgongdu kristnu (eg eri eisini kristin) verður settur til viks, til frama fyri sakliga og demokratiska viðgerð av rúsdrekkalógini? Meirilutin av Føroya fólki eru ikki samd við Jenis, Jógvan, Bill og teimum. Ein kanning var eisini gjørd, har yvir 60 % av teimum spurdu vildu hava øl og vín í matvøruhandlarnar.

**Ljóta og vanvirðiliga heiti "rúsdrekka"**
At bólka øl og vín undir heitinum rúsdrekka er eitt keðiligt og óestetiskt fokus at leggja á hesar leskidrykkir, tí teir eru nevniliga tað fyrst av øllum: leskidrykkir. Orðið "rúsdrekka" leggur bert dent á virkningin, og sigur einki um góðsku ella smakk – eitt typiskt óestetiskt og neiligt føroyskt heiti. Øl og vín eru gamlir, mentaðir og óskaðiligir leskidrykkir. Øll ovurnýtsla er ring og skaðilig. Tað er sanniliga eisini galdandi fyri grind og spik, kakur, sjokoláta, sodavatn o.s.fr. Sum Shakespeare skrivaði í leikriti sínum "Julius Caesar": "The fault, dear Brutus, is not in our stars, but in ourselves." Hetta sitat sipar til, at ljótar gerðir ella útsagnir koma ikki uttanífrá, men innan í okkum sjálvi. Tað er einki galið við øl og vín ella aðrari rúsdrekka, tað er okkum sjálv tað er galið við, um vit gera nakað ljótt í fylliskapi. Skulu vit taka ábyrgdina frá vaksnum fólki, við at lóggeva um hvat tey mugu og ikki í síni frítíð? Og hví halda okkara sjálvútróptu kristiligu "übermench", at tað eru teir, sum eru ein minniluti, ið skulu ráða yvir restina av okkum? Tað er heldur ikki upp til politikarar at siga, hvat fólk hava loyvi til í teirri frítíð, tá tað ikki snýr seg um nakað ólóligt. Síðst eg visti var rúsdrekka lóglig í Føroyum, og so leingi rúsdrekka er lóglig er øll argumentatión ímóti bryggjan av sterkum øli og framleiðslu av aðrari rúsdrekka í Føroyum vitanarnoktilsi og annar illvilji.

**So endaði ein aftur í Kána**
Um rúsdrekka er av tí illa, ella frammanar tað illa, so gjørdi upphavið til kristindómin eina dáragerð í brúdleypinum í Kána. Tað er tó ikki skapanin frá vatn til vín hjá Kristusi eg vil tosa um, men tað, at fólk tá virdu víni og høvdu eina meining um hvat var gott ella minni gott vín. Har var ein góðsku tilvitan um vín. Tað var nevniliga ikki bert ein rúsandi løgur; tað var ein leskidrykkur.

Eftir at høvuðskokkurin við brúdleypið í Kána hevur fingið vínið, sum Jesus hevði skapt, segði hann við brúðgómin:

"Hvør maður setir fyrst hitt góða vínið fram, og tá ið teir eru vorðnir druknir, hitt ringara; tú hevur goymt hitt góða vínið líka til nú." Joh. 2,10.

Her er heilt greitt talan um vín-mentan – ikki "rúsdrekka". Vínið hjá Jesusi var gott, og tað var siðvenja at borðreiða við tí góða víninum fyrst, tí tey drukku fleiri gløs av víni, og gjørdust at enda drukkin; og sum flest fólk vita, er tað fyrsta glasið av víni tað besta. Sitatið úr Jóhannes evangeliinum sigur sostatt, at fólk vóru góðskutilvitaði um vín, og at tey drukku meira enn eitt glas, og tað hevði upphavið til kristindómin, Jesus Kristus, einki ímóti, annars hevði hann ikki gjørt vatn til vín.

**Orð eru ikki "bert" orð**
Orðið "rúsdrekka" leggur beinanvegin ein narkotiskan dám á og gevur neiligt hugasamband við fylliskap, og gevur sostatt neiligar tankar um t.d. øl og vín. Og tað er eingin orsøk til tað. Á enskum nýta teir orðið "spirits" um rúsdrekka. "Spirits" sipar sambært "Penguin English Dictionary" til tað glaða og lívliga menniskja: "...a cheerful or lively frame of mind." "Spirit" merkir jú eisini andi ella sál. "Spirits" sipar sostatt til ein glaðan og lívligan sinnisstand, og tískil eina kenslu av sinnisligari vælveru. Meðan "rúsdrekka" sipar til tað at vera rúsaður, og tískil tað at missa sjálvræði á kenslum og atferð – bæði í gleði og øði. Orð eru altso ikki bara orð. Orð hava týdning og ávirka okkara fatan av tí, tey lýsa.

# Munur á fólki?

JÓNA MORTENSEN



Eri fyri stuttum komin heim aftur á klettarnar. Eg havi verið til stráluviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum og búði í tí sambandi á Hotel Torshavn í næstan seks vikur.

Áðrenn stráluviðgerðinar var eg niðri fýra ferðir, fyrst til skurðviðgerð og síðani til kemoviðgerð. Hetta skal nú ikki verða nøkur lívssøga. Tað eg vil nerta við, er, at tað er sera óheppið, at Landsjúkrahúsið ger mun á fólki, tá tað snýr seg um at fáa fylgjara við til Danmarkar. Eg fekk at vita fyrstu ferð, eg skuldi niður, at eg vegna sparingar ongan fekk við, sjálvt um eg skuldi opererast og hava boð um, hvat tey funnu har. Tað mátti eg so bara finna meg í. Men tað sum eg síðani upplivdi á Hotel Torshavn var, at meginparturin av sjúklingunum, ið vóru har, høvdu onkran við, játtað av Landsjúkrahúsinum.

Tey vóru rættiliga kløkk um, at eg ikki hevði fingið nakran við. Men soleiðis var tað so hvørja ferð, eg fekk ongan við nakrantíð. Eg sat saman við fólki á hotellinum, sum vóru í somu ørindum sum eg, diagnosan var júst tann sama sum mín, og har var fylgjari við hvørja ferð. Tá eg so skuldi niður til stráluviðgerð hugsaði eg, at nú man eg fara at fáa játtað fylgjara, í um ikki annað eina viku av teim seks vikunum. Men nei har var einki at gera, eg fekk ongan við. Tað sum eg vil við hesum brævi er, at soleiðis kann ein ikki fara við fólki. Eg kærdi málið, men fekk ikki viðhald. Av Landsjúkrahúsinum fekk eg eitt bræv, har tað stóð, at ein fekk ikki fylgjara við, tá ein skuldi til stráluviðgerð. Harragud, eg veit, at hattar ikki passar. Har vóru fýra sjúklingar, sum eisini skuldu hava stráluviðgerð, øll vóru væl fyri, onkur kanska betur fyri enn eg. Tey høvdu øll fylgjara við.

Eitt er at fáa eina sjúku at fyrihalda seg til, men eg haldi, at tað er óneyðugt at verða órættvíst viðfarin omaná. Soleiðis følir ein tað nemmiliga. Ikki tí, eg skal nokk klára meg, men tað eru allarhelst ikki øll, ið gera tað og ikki øll, ið tora ella hava orku í eini tílíkari støðu at siga frá. Tað kann ikki verða so, at onkur fær fylgjara hvørja ferð og ein annar ongantíð (tá diagnosan er tann sama). Tað er alt í lagi við sparingum, men tit mugu hava eina linju at ganga eftir, so øll verða viðgjørd ella viðfarin á sama hátt. Sum er gera tit mun á fólki, og tað er sera óheppið í eini tílíkari støðu.

